# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

**Bilradio hósdagin kl. 16.05**
Í sendingini er samrøða við Mogens Wraae, koyrilærara, og við Tummas Paula av Reyni, sum fortelur um Frankfurt Motorshow. Eisini er prát við Hans Waag og Niels Juel Nattestad frá Effo
RÁS 2 ...títt radio



# Frankfurt Motorshow 2009

Altjóða bilaframsýningin Frankfurt Motorshow er ein av heimsins størstu og mest vitjaðu framsýningum. Tummas Pauli av Reyni, sýnsmaður hjá tryggingarfelagnum Trygd, var ein av teimum sum vitjaðu framsýningina í september.

Hóast kreppu í bilaídnaðinum var altjóða bilaframsýningin í Frankfurt, sum er annaðhvørt ár, ikki nógv minni enn fyri tveimum árum síðan.

Á framsýningini vóru 753 framsýnarar og ikki minni enn 82 heimspremierur av nýggjum bilum.

Har var alt frá bilnýggjheitum og konseptbilum til sergjørdar bilar, ellisakfør og motorsúkklur.

Vit hava her nakrar myndir, sum Tummas Pauli av Reyni hevur tikið hevur tikið á framsýningini. Samrøða er eisini við Tummas Paula í sendingini Bilradio hósdagin kl 16.05.

**mg**



*Tummas Pauli av Reyni tók myndir á Frankfurt Motorshow*



*Kia Soul konseptbilur við last*



*Volkswagwn L1 concept*



*Nýggjur Trabant sum elbilur*



*Ellisakfør vóru eisini á Framsýningini*



*Saab 9.5 í nýggjastu útgávuni*



*Renault Twizy Z.E. Concept*